Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Frá: Firouz Gaini, Keypmannahavn, fgaini@iname.com

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 20.03.01

Til: birgir@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Keypmannahavn úr Café Riga

834 ár eftir at erkibiskupurin Absalon víggirdi »Havnina« við sterkum verjugørðum, siti eg í eini sofu í Café Riga og drekki capuccino. Á døgum Absalonar var hesin býurin, Keypmanna Havn, goymslupláss og flutningsmiðstøð fyri alskyns handilsvørur til londini kring Eystrasalt, og verjugarðarnir skuldu verja býin ímóti álopum frá vendarunum. Absalon hevði fingið »Havnina« í gávu frá vini sínum Valdemari Stóra. Heilt fram til 1850'ini var hon av hernaðarligum orsøkum avmarkað av víggirðingunum: alt úr kjallarum og loftsrúmum til bakhús og goymslurúm virkaði sum íbúðir hjá fátækum familjum.

5000 keypmannahavnarar doyðu av kolera í 1853, og trý ár seinni fóru menn at byggja hús uttan fyri verjugarðarnar. Fólkatalið vaks nógv hesi árini; í 1880 vóru 235 000 íbúgvar, og verjugarðarnir við teimum fýra býportrunum vórðu tiknir niður í 1886. Keypmannahavn varð nú ein prýðiligur stórbýur við nýggjum býarpørtum til arbeiðarastættina.

Vesterbro, ein av hesum býarpørtunum, er vestan fyri núverandi Rådhuspladsen (tað gamla Halmtorvet), og her liggur hugnaliga Café Riga við sínum stóru og bleytu sofum, ið geva staðnum ein heimligan dám.

Eg búði eitt skifti á lítlari síðugøtu á Vesterbro, ið gongur frá Vesterbros Torv til Halmtorvet. Eskildsgade er friðarlig og ókend fyri tey flestu; tó eyðkend av sínum reyðu lanternum, ið lýsa innan fyri nógv kjallaravindeygu í skýmingini. Gøtan hevur tvær góðar thai-matstovur, tann eina hevur ongantíð meira enn 2-3 gestir. Og ein undarligan hárfríðkara, Adam, ið hevur fylt stovuna hjá sær við kaffikannum, kassettubondum, útvarpstólum, telefonum, køliskápum og øðrum gomlum »burturkasti«. Adam hevur opið bæði sunnumorgun og leygarkvøld; hesin gamli maðurin livir mestsum í síni hárfríðkanarstovu. Adam og vinmenn hansara eru úr heitum londum túsundtals kilometrar frá lítlu Eskildsgade.

Ein nýggjur skúli við HF-stakgreinum liggur eisini í gøtuni. Á horninum Halmtorvet-Eskildsgade er ein stór kiosk, ið hevur opið 24 tímar í samdøgrið 7 dagar um vikuna, 365 dagar um árið. Hýrivognsførarar, skøkjur, rúsevnismisnýtarar og onnur, ið arbeiða á náttartíð, eru góðir kundar her. Botnurin í tí socialu og búskaparligu pyramiduni er at síggja í hesum vesterbrogøtum, tey sum eru dottin úr samfelagnum, tey sum liva ein dag í senn, tey sum doyggja undir myrkum trappum... og tey væleydnaðu halda seg langt vekk frá teimum »miseydnaðu«, ið eru gott undirhald í sjónvarpinum.

Vesterbro er ein fjølbroyttur og áhugaverdur býarpartur við ørgrynnu av caféum, matstovum, biografum og forvitnisligum handlum. Nógv fólkasløg búgva her: bornholmarar, jydar, føroyingar, kurdar, pakistanarar, thailendarar og so framvegis. Í fjølmiðlunum verður Vesterbro tíverri lýst at vera ein vandamikil og niðurslitin býarpartur við íbúgvum »på overførselsindkomster«. Ein ræðulig sjónvarpssending hevur gingið í donskum sjónvarpi eina tíð, hon eitur »Historier fra en politistation« og letur hyggjaran fylgja gerandisliga arbeiðnum hjá løgregluni á Vesterbro (eg haldi eisini SvF hevur havt hana á skránni!). Í sínum fínu stovum sita væleydnaðar familjur kring alt landið og hyggja at eini ungari kvinnu, ið skræðir klæðini av sínum skroypiliga kroppi, meðan hon skríggjar seg hása og rullar runt á tí ískalda fongsilsgólvinum. Kvinnan er heroinmisnýtari og er um at doyggja av rúsfjáltri. Ongin spurdi hana, um hon ynskti at luttaka í sjónvarpssendingini, ið onga virðing hevur fyri teimum veikastu. Bjarne L. Henriksen, leiðari í Kirkens Korshær, sigur soleiðis um sendingina: »...Den er socialpornografisk underholdning...når det kommer til stykket, ligger den menneskelige elendighed hos politiet, journalisten og DR1. Deres værdighed ligger væsentlig under de mennesker, de udstiller«.

Fólk koma og fara á Café Riga, men eg og vinur mín sita enn og práta um lívið í stórbýnum, meðan suðið av motorferðsluni úti í gøtuni blandast við tónleikin, ið kemur úr hátalarunum.

**FLØGUUMMÆLI. Frá rokk til Beach-Boys tónar. Disko og punk. Nýggja útgávan hjá Manic Street Preachers hevur tað alt**

# Kenn tín fígginda

TÓNLEIKUR

*Birita Andreasen*

Eftir ein eitt-ára steðg sendu teir tríggir barndómsvinirnir Nick Wire, James Dean Bradfield og Sean Moore tann 19. mars teirra sættu fløguútgávu á marknaðin.

Know Your Enemy er heitið á fløguni. Sambært basspælaranum Nick Wire, so sipar heitið til ein sjálvan. »Í síðsta enda, so er tú tín egni ringasti fíggindi«, segði tekst-skrivarin í arbeiðaraklassabólkinum herfyri, tá hann var til pressufund á d'Angleterre í Keypmannahavn.

## Kuba

Fyrsta framførslan av nýggja tilfarinum hjá bólkinum var í Havanna í Kuba. Sum sangarin, James Dean Bradfield, sigur á lagnum Let Robeson Sing, so møttu teir sjálvum Fidel Castro undir teirra vitjan í Kuba.

Men víðgongt vinstrasinnaðir hava teir nú verið síðani byrjanina. Kendi sangurin av fyrru fløguni This Is My Truth Tell Me Yours, snúði seg um spanska borgarakríggið og hevði heitið If You Tolerate This Your Children Will Be Next.

## Blanda

Fløgan er als ikki líka popput sum tann fyrra. Hon byrjar við fullari ferð við lagnum Found That Soul. Sangurin rokkar! Stílurin gjøgnum fløguna er tó sera fjølbroyttur, so lat teg ikki lumpa av fyrsta lagnum. Men samanumtikið, so er útgávan meira punkut, enn tað, vit eru von við at hoyra frá bólkinum. Líkist kanska meir tí, sum teir byrjaðu við fyri sløkum 10 árum síðani. Eitt diskolag, Miss Europa Disco Dancer, hevur eisini fingið pláss á útgávuni.

Men hóast rokk og harðar gittartónar, so eru eisini bleytari løg sum So Why So Sad og Ocean Spray, har tann avslappandi og lætt hvínandi røddin hjá Bradfield veruliga kemur til sín rætt.

## Boðskapurin

Hesin bólkur, sum hevur støði í arbeiðarastættini, hevði frá byrjan av sum mál at nema hjarta eins og vit hjá áhoyrarinum. Bólkurin hevur eitt greitt politiskt sjónarmið, og hetta er eisini boðskapurin í teirra tekstum. Eitt sindur provokerandi eru teir íðnu gøtuprædikararnir eisini. Við at blanda tað við skemti, gera teir tað uttan at lyfta peikipingurin alt ov nógv. Í sanginum Freedom Of Speech Won't Feed My Children, syngja teir um rumpuna hjá Dalai Lama. Her skjóta teir eftir teimun sjálvrættvísu, ið nýta Dalai Lama til at reinsa teirra samvitsku, men ikki leggja í fátækradømi og neyð í heiminum. Baby Elian tekur støði í málinum um lítla kubanska dreingin, ið bleiv tikin til USA.

Eftir at hava lurtað eftir fløguni fyrstu ferð, fall eg fyri teimum melodiøsu tónunum og helt, at restin var heilt okey. Hetta var helst eisini orsakað av, at fyrra útgávan This Is My Truth Tell Me Yours hevur eitt av heiðursplássunum í míni fløgusamling. Men eftir at hava lurtað fløguna nakrar ferðir ígjøgnum, so haldi eg, at hendan er góð øll sum hon er. Og eg ivist ikki í, at hetta er ein av teimum, ið bara blívur betri, jú oftari ein lurtar eftir henni.



*Birita Andreasen er næmingur í Kungalv í Svøríki. Í løtuni er hon í starvsvenjing á Sosialinum* *Mynd: Jens Kr. Vang*

# Til mín góða, gamla vin Hans á hansara seksti ára degi



Lag: Reyparin 45 grader vest.

Ja sum eg nú í tonkum mínum
bilsin fylgi við
ið hvussu tíðin rann avstað
og tók so mangt á glið.
Tú minnist sjálvsagt lampurnar
– í skýming pussa glas –
tú hóma kundi gluggarnar,
men ikki tún og gras.

So huldisligt í myrkrinum
tá hann av suðri lág,
og glæðurnar við oysregni
í skjøldur skriktu tá.
Hvør kendi ikki Artatrøll
og mong av sama slag.
Tú bangin royndi signa teg,
og »Fader vor« tú bað.

Men so var tað, at fyrsta ljósa
gøtulyktin kom,
tá hvurvu skjótt øll trøllini
og ikki sást ein skon,
tí nú var tað sum summartíð
og vetur saman rann,
sjálvt torvið og petroleum,
úr vára lívi svann.

Við murtatráðu møttust vit
á støðni manga ferð.
Vit høvdu báðir pisur smáar,
ábyrgd alt tað ber.
Í dag vit hava stórar pisur
(ternumurt) okey.
Tær seta báðar størri krøv
og líða onga neyð.

Men fram við Oyrabakkanum
har gamli ósin rann,
vit veiddu mangt eitt sli og erju
upp í vára spann.
Og tá so brimið øgisligt
um Húsabakka vóð,
á skeri undir Eirikstoftum,
mangan hart á stóð.

Tá var tað gamli lærarin
»hin grái« ringdi inn.
Hann ramsaði upp Habakukk
og mangt eitt gamalt skinn
úr Katakismus, sum hon var
»ein fløkja uttan vit«
vit tvungnir máttu ramsa upp
við bæði bit og slit.

So knappliga rópti grindaboð,
tá runnu vit væl nógv,
úr neysti løgdu lunnar út
so bátin skjótt á sjógv,
tá róðu allir grindabátar
kappingin var hørð.
Eg gloymi ei ta myndina
fimm áttamannafør.

Í drápinum var skilið ikki
av tí besta slag,
hálvørir menn sum váknið kasta
uttan mið og stað.
Teir raktu inn í nýruni –
í grøn – og hamarskjøl
so svakir gjørdust hvalirnir
teir knústu stokk og fjøl.

Tá sukku vit í bárunum,
í blóð og reyðan sjógv,
at svimja millum hvalir – bátar – vákn
tað fylti nógv,
men tíanbetur ongantíð
av nøkrum skaði stóð,
ja, væl so runnu ungdómsár,
so friðarlig og góð.

Við Íslands strond »Við Dangu«
løgdu toskin vit í salt,
so spennandi hvørt leygarkvøld
at fáa lippur talt.
Men tá vit inn í »Beiin« stevndu,
frið hvønn sunnudag,
tá smíltust allar »Stylkurnar«
og ristust oman knæ.

Á harujakt á klubbanum
so spennandi tað var,
at lúra millum skursl og klettar
undir Hamarsgarð,
ja, tá ein kringur harufrensur,
undan okkum rann,
tá alt í einum skotið varð,
tað ei í honum »spann«.

Men tú – tú søkti hæddirnar,
og slepti tær á flog.
Eg helt meg mest á jørðini,
eg hevði styttri boð.
Men oman fyri skýggini,
har eydnuspælið spann,
har fanst tú sjálva ternuna,
sum ástin frá tær vann.

Nú hava vit so báðir rundað
trýssinstjúgu ár.
Mær tykist tó at árstíðin
hjá okkum enn er vár.
Men gævi Gud, hann signi tykkum
bæði frísk og fró.
Hann gevi tykkum báðum saman
fleiri ár so góð.

Vit enda við
lag: gev okkum Skipper Skrekk

Ja, nú verður kanska tað
at vit fáa boð ein dag,
um loysing frá Danmark
og stýra á flog,
men tá mást – tú – fáa boð.

Hjartaliga tillukku!

**J. E.E.**

## Seinkað kvøða til Kvinnudagin

# Til Móður á ellisárum

Tá hugsan mín fer heim á fornar slóðir,
mær berst í huga minnir mong og ljóð.
Men best av øllum minnist eg tó móður;
so mild tú vart og børnum tínum góð.
Eg altíð minnast vil, ta gávu goyma
har gleði mín og sorgir áttu heima,
á fedragarði fjálgt eg stóð –.
Frá morgni lívsins mildir geislar streyma
um barnaár so bjørt og fróð.

Tú átti kraft og mikið verk at inna,
men sjálv var tú tær miskunnleys og hørð
tú vildi vælferð børnum tínum vinna
tú vildi verja teirra ættarjørð.
Frá barni átti tú hin góða anda,
sum veitir tjóðum ást til fosturlanda
og økir teirra kraft og trú.
Bert búnast kann úr mildum móðuranda
slíkt ljós sum í mær býr – –
og tað er tú.
– – – – – –
Tá fyrst eg fór úr faðirs forna garði
mær einglaskjól var móðurhugsan tín.
Hann var hin bjarta brynja ið meg vardi
ein Gudaskjøldur – Verndareingil mín,
ið ferðast víða, vakir tá tú svevur,
veit alt hvat sál og huga mínum krevur
um fjarløgd høv og ytstu sker.
Hann broytist ei – og eyga við mær hevur
og varnast alt, ið fyri framman er.

Tá fyri oyra mær berst vøgguvísa
Í hugan rennur vøgguvísan tín
Úr havið sá eg háfjøll um meg rísa
At heilsa tær var fyrsta gleði mín
tá sá eg Føroyar størst av øllum londum.
Ókomin ár í vernd av einglahondum,
ið lív mær gav – og vón í lon.
Meg minnir móðir teg á heimastrondum
tú fevndi har tín kæra son.

Í eygum tínum sá eg kenslur eymar
sum fagrir tónar orð eið kundu mælt.
So miklir vóru tínir móðurdreymar,
tó flestar teirra hevur frosti fjalt.
Sum hetja bart tú harm og sorgarstundir –
tú ugga bar í neyð til sáru lundir.
Viðkvom í sál – men viljasterk.
Nú ljóma um teg farin ár og stundir,
nú tøkk tær ber títt egna verk.
– – – –
Eg beri móður tøkk tær túsundfaldar
so tjóðin øll má hoyra kvæði mítt,
tá Føroya bestu møður verða taldar
tá vil tað ljóma fagurt navnið títt.
Ver signað øll tín umsorgan og vinna
ver halgað hús títt garður fedra mína,
sum goymir gomul spor og ár.
Lat signing tína her um garðar skína.
Brátt verða skal um ævir vár.

Úr Ísl.
Eftir Viggo Johannesen